VIÐMERKINGAR

# Skipað viðurskifti

**Regin I. Jakobsen**

Nú hoyrist, at føroyski ungdómurin ongar trupulleikar hevur av at útvega sær rúsdrekka, og at hesi somuleiðis seta met í mun til grannalond okkara hvat royking viðvíkur.

Hetta fær meg sum granni hjá badmintonhøllini í Gundadali í Havn at undrast á, hvar samanhangurin er millum tann í landinum førda rúsdrekkapolitikk og teir karmar Tórshavnar Býráð skapar til ungdómin, her børn niður í 12-13 ára aldur liggja og rulla á gøtuni til út ímóti kl. 5 á morgni. Tílík viðurskifti eru óhugsandi í grannalondum okkara, sum annars hava munandi meira frælslynta rúsdrekkalóggávu. Hesi viðurskifti eru tó galdandi í landinum við ivaleyst strangastu rúsdrekkalóg her um leiðir. T.d. mugu skeinkistøð ómøguliga sleppa at skeinkja eitt glas av víni ella eina øl (fyri vaksnum) uttandura.

Hetta er í stórari andsøgn við tað, vit grannar hjá badmintonhøllini javnan eru vitni til, tá hetta annars so friðarliga ítróttarøkið í vikuskiftum umskapast til tað ein best kann sammeta við ein vígvøll til út ímóti morgni. Dansurin endar kl. 3.30 og gangurin heldur ofta fram til klokkuni líður væl fimm. Tey ungu sleppa (sjálvsagt) ikki inn við rúsandi løgi, so urtagarðarnir í grannalagnum verða tí nýttir at ballast í og til nátthús - ikki løgið, tí vesiviðurskiftini í høllini svara als ikki til loyvda talið á dansifólki. Larmurin er øgiligur og børn okkara eru bangin og stúra fyri slíkum náttum.

Eg havi sjálvandi forstáilsi fyri, at tey ungu skulu hava møguleika at sleppa í dans, og eg skilji væl at nógvur gangur er rundan um slík støð, eins og tað var tá eg var ungur. Tað er tó harmiligt, at hetta tiltak verður hildið í einum íbúðarøki, tí tað er tað fullkomiliga óegnað til.

Skaði er gjørdur á bilar og urtagarðar, fløskur verða tveittar allastaðni, brotnar, bæði á sjálvum ítróttarvøllunum, á ítróttarøkinum og økinum rundan um og annað slíkt. Oftast er neyðugt at rudda og sópa rundan um húsini sunnumorgnar. Viðmerkjast kann, at tílíkt einans kemur fyri í sambandi við at dansitiltøk fyri ung verða fyriskipað í badmintonhøllini.

Av tí at tað eru fútin og býráðið, ið geva loyvi til at almennur dansur kann verða hildin á ávísum staði, hava vit kært okkara neyð til borgarstjóran. Hann hevur tó ikki latið við seg koma, hóast alt grannalagið undirskrivaði mótmælisskriv til býráðið. Tað er harmiligt, at vit sum borgarar hava so torfført at fáa sjónarmið okkara hoyrd, hóast politiviðtøkur verða brotnar hvørja ferð dansur verður hildin.

Sjálvandi kann sigast, at tað fyrst og fremst eru foreldrini, ið hava ábyrgdina av sínum børnum, men tað eru hóast alt fútin og býráðið, sum, við at loyva dansi fyri børnum heilt niður í 12 ára aldur til klokkan hálvgum fýra um morgunin, ganga hond í hond og skapa karmar til, at ungdómurin rekst í gøtunum til út á morgunin.

Býráðsval stendur fyri durum og grannalagið í Gundadali vónar, at komandi býráð vísir okkara ynskjum um náttarfrið størri virðing og vælvild enn sitandi býráð hevur gjørt. Mær kunnugt gongur loyvið hjá badmintonhøllini til at hava almennan dans út í komandi mánað. Eitt nývalt býráð skal tí taka støðu til, hvar dansur skal haldast í framtíðini. T.d. eigur kommunan nú høllina á Hálsi og hevði henda verið munandi betri egnað til endamálið, tí hon liggur ikki í íbúðarøki.

Mín vón er, at dansiviðurskiftini hjá ungdóminum gerast nøktandi. Somuleiðis áttu stig at verið tikin til, at orða ein ungdómspolitikk fyri kommununa sum heild.

Við vón um, at skipað viðurskifti koma í lag.

# Lyfta á Býarbókasavninum

**Starvsfólkið á Býarbókasavninum**

Nú hevur tað fleiri ferðir verið frammi í fjølmiðlunum, at fólk, sum eru rørslutarnað, og fólk við barnavogni sleppa ikki inn á Býarbókasavnið í Havn, tí ongin lyfta er.

Í fjør vitjaðu umleið 80.000 fólk bókasavnið, og talið er vaksandi. Býarbókasavnið liggur í miðbýnum, men atkomuviðurskiftini eru sera ótíðarhóskandi. Savnið heldur til á 2. og 3. hædd, høvuðsinngongdin á 1. hædd er sera trong og trappurnar smalar. Javnan verða vit starvsfólk mint á vánaligu støðuna, tá bæði illa gongd fólk og foreldur við smábørnum stríða seg upp tær nógvu trappurnar. Haraftrat eru tað so øll tey, sum vit ongantíð síggja, tí tey ongan møguleika hava at koma inn. Sum starvsfólk kenna vit okkum illa av vánaligu støðuni. Býarbókasavnið hevur fleiri ferðir gjørt vart við trupulleikan hjá Tórshavnar kommunu, men fyribils uttan nakað ítøkiligt úrslit. Í dag skuldi tað verið ein sjálvfylgja, at eitt alment bókasavn er atkomuligt fyri øll, og tí fara vit at heita á Tórshavnar kommunu sum skjótast at finna eina loysn á málinum.

# Politikkur er at raðfesta

**Steinbjørn O. Jacobsen**
*borgarstjóri*



VAL04

Valstríðið hevur verið í hæddini og nú er dagurin komin, at krossurin skal setast.

Ein hevur varhugan av, at stríðið er makari, enn tað onkuntíð hevur verið. Ein orsøk kann vera, at framtíðarhimmalin ikki júst glógvar í sólskini, men tað eigur ikki at geva orsøkir til at setast í favn. Tey tyngru tøkini skulu eisini takast, og júst tá er neyðugt at lyfta í felag.

Tó hevur eisini hesaferð verið oyst út við gyltum lyftum um bæði eitt og annað – líkt og ólíkt – og júst í tí liggur spenningurin at vita hvussu fer at hilnast hjá teimum, ið bjóða seg fram. Hvørjum roknar borgarin við, og hvat roknar hann sum týdningarmikið í einum framkomnum samfelag.

Eg kann taka undir við vísmanninum, ið segði: "Vit kunnu bara fegnast um, at øll vallyftini ikki vórðu framd, tí so stóðu vit í botnleysari skuld".

Tað er gaman í einsamallur at lova gull og grønar skógir, men tá komið var inn um býráðsins gátt, og tey innvaldu sessaðust um borðið at taka avgerðir, mátti mangan sannast, at tá raðfestast skuldi, sjúnkaðu mangan sjálvt tey mest spennandi vallyfti niður í bunkan.

Seinastu fýra árini hevur Klaksvíkar býráð arbeitt við einari langtíðarraðfesting fyri at brynja miðdepilin í Norðoyggjum til komandi tíðir. Reyði tráðurin hevur verið ein varin fíggjarpolitikkur á íløgusíðuni, fyri at konsolidera pengakassan til møguliga meira krevjandi tíðir – tíðir við lakari peningarrensli.

Hesin árini høvdu verið strævin, um ikki samstarvið hevði verið so fyrimyndarligt. Við tí í huga haldi eg meg til at taka eitt tak afturat, um veljarin sýnir mær neyðuga álitið.

**Eg vil við hesum bera fram eina seinastu inniligu áheitan: Farið á val. Setið kross við eitt av valevnunum á lista E.**

# Hvat krevst fyri at rødd Miðfloksins verður at hoyra í Býráðnum?

**f. Miðflokkin**
*Jenis av Rana*



Við seinasta býráðsval fekk Miðflokkurin 488 atkvøður - tvs. gott og væl 200 ov fáar til at fáa býráðslim valdan. Síðani tá hava tvey Løgtingsval verið, í 2002 fekk Miðflokkurin 601 atkvøðu í Suðurstreymi, men við valið í januar 2004 øktist talið til 790 atkvøður.

Tølini vísa at undirtøkan til Býráðsvalið 2000 var nógv minni enn til løgtingsvalini bæði, og at stór framgongd var til løgtingsvalið seinast. Fortreytin fyri at fáa umboð valt er, at hendan framgongdin heldur sær - og gott og væl tað, tí helst krevjast góðar 700 atkvøður fyri at fáa fyrsta umboðið.

Letur tað seg gera at fáa umboð?

Svarið er tengt at um tú metir, at tað, sum Miðflokkurin ber fram í føroyskum politikki, hevur týdning. Metir tú tað, biðja vit teg um ( enn einaferð) at geva Miðflokkinum atkvøðu tína, tí hon er avgerandi fyri, at Miðflokkasjónarmið kunnu hoyrast, har avgerðirnar verða tiknar

*p.s. Royn og fá onkran við tær at stuðla Miðflokkin.*

# Bústaðartrupulleikin í Havnini

**Charlotta á Váli Olsen**
*Valevni fyri Miðflokkin í Suðurstreymi*



VAL04

Sum øllum kunnugt er stórur trupuleiki at fáa tak yvir høvdið í Havnini. Ert tú heppin at fáa eina íbúð/hús, skalt tú gjalda tað hvíta úr eygunum fyri hana, líka mikið um tað er til leigu ella keyp. Hetta gera byggihávar og spekulantar sær dælt av. Enntá grundstykki frá kommununi kostar sum eini hálv hús aðra staðir.

Hvussu skulu tey ungu, sum ætla at seta føtur undir egið borð klára at koma upp undan? Fyri tað fysta mugu minst 2 vanligar inntøkur til, helst eyka arbeiði. Hava tey so børn, mugu tey vera ansaði og kostar tað eisini. Alt í alt verður dagligdagurin hjá hesi familju so tungur, at tað bert verður orka til arbeiði og tað neyðugasta í heiminum. Ongin orka til hvønn annan og børnini. Hetta hevur so nógvar syrgiligar fylgjur, at vit áttu at følt okkum skyldugan til at gera nakað við henda trupuleika meðan nakað enn stendur til at bjarga.

Fyri tað fyrsta átti grundstykkjaprísurin ikki at verið so nógv hægri enn í øðrum kommunum. Harnæst skuldi húsalánsgrunnurin ella líknandi stovnur fari og kanna hvørja íbúð og hvørt hús, sum verður bygt ella er til sølu og virðismett tað, og so átti ikki at verið farið stórt út um tann prísin. Soleiðis kundu vit hildið húsaprísunum á einum fólkaligum støði.

Hetta hevði gjørt trivnaðin fyri familjurnar í kommunu okkara nógv betri!



VIÐMERKINGAR

# Kommunan skal taka ábyrgd

**Bjørg Joensen**
*Valevni hjá Javnaðarflokkinum til býráðsvalið*



VAL04

**Ábyrgdarbýtið**
Ein trupulleiki hjá landinum kann gerast ein møguleiki hjá kommununi. Vit hava í nógv ár hoyrt um t.d. eldraøkið, um tey heimleysu og um íbúðartrupulleikan. Hesi øki eru enn landsmál ella felagsmál. Tá ábyrgdarbýti er ógreitt ella ábyrgdin er býtt millum fleiri, er vansin ofta, at ongin kennir seg hava ábyrgdina. Og so hendir lítið. Hetta kenna vit frá arbeiðsplássinum.

Vit kunnu ikki sita og bíða. Vit skulu taka ábyrgdina og fara ígongd beinanveg. Tað er langt á mál, men teinurin styttist ikki av tí, at man útsetir at gera nakað við tað, heldur tvørturímóti. Harafturat er tað óvirðiligt. Vit kenna tað øll og eru samd um, at viðurskiftini á nevndu økjum eru óvirðilig. Vit eru samd um, at økini mugu raðfestast og at nakað má og skal gerast nú.

**Búskaparlig stagnering og virksemi**
Tórshavnar Kommuna er ikki í truplari støðu, hóast ein ávís stagnering er í búskapinum í løtuni. Tá hugt verður eftir, hvussu virksemið í landinum er háttað, er byggivinnan eitt gott mið. Hon er fyrsti liðurin í ketuni, sum eisini skapar virksemi aðrastaðni. Tað er tí sera umráðandi, at byggivinnan er virkin. Við at byggja eftir førimuni - kemur tað eisini øðrum vinnum tilgóðar.

# Kommunan fyri øll

**Eiley W. Hansen**



VAL04

Eg fari aftur til hetta kommunuvalið at bjóða meg fram til at mynda bygdarráði í Sørvági.

Eitt av mínum hjartamálum er at vit kunnu varðveita gomlu bygdina.

Eg havi alt mítt lív búð í bygdini og ein sannroynd er, at tað nívir meg nógv at síggja hvussu gamla bygdin sær út í dag. Eg meini at vit skylda okkara forfedrum at virða teirra arbeiði.

Kommunan fekk í 1985 húsini hjá Hans Nikláa til ognar, treyta av at tey vóru gjørd til savn fyri Sørvágs bygd. Hetta var í 1986, skjótt 20 ár síðan og ikki er komið á mál enn.

Eg ímyndi mær at um 5 - 10 ár hava vit fingið eina nýggja miðbygd. At vit hava fingið lív aftur í tey gomlu húsini sum í dag standa sum ein skomm fyri Sørvágs bygd.

Í mínum arbeiði í bygdarráðnum vildi eg lagt dent á at kommunan er fyri okkum øll. Ung, gomul, høg og lág.

Hevði ikki funnið meg í at siti sum ífylla, men vildi arbeitt aktivt fyri at nátt mínum málum.

Eg fari at heita á fólkið í Sørvági, Bø, Gásadali og Mykinesi um, at tit til hetta kommunuvalið hugsa tykkum væl um áðrenn tit seta krossin týsdagin 09. november og velja eftir tykkara egnu sannføring hvør skal umboða tykkara áhugamál næstu fýra árini.

Sørvágur er ein vøkur bygd og her trívast fólk, men sjálvsagt ber til at gera tað betur.

Geva tit mær álit so vil eg av fullum hug brúka tað tíð tað krevst at náa mínum málum. Kommununi og bygdafólkið at gagni.

# Gott tvørafólk

**Jón Guttesen**
*Valevni á Samgongulistanum*

Kravboðini til okkum sum bjóða okkum fram til býráði eru klár. Vit tørva arbeiðspláss og eitt fjøltáttað og kraftmikið vinnulív. Vit tørva trivnað, einamest hjá ungdóminum, og vit tørva eitt virkið frítíðar og mentanarlív.

Komandi árini fær Tvøroyri ein kærkomnan skáa frá tí lemjandi lánsbyrðu, ið liggur á okkum í dag.

Mín boðskapur er tí greiður: Sjáldan hevur tað verðið meiri týðandi hvussu vit skipa okkum, og hvussu vit stjórna komandi árini.

**Ungdómur**
Eg vil ein bý har ungdómurin fær rúmd og kor, so hann trívist og mennist, knýtur bond og fær rótafesti. Eg vil ein bý, har vit fjálga um ungdómin. Tí skal ungdómsráðgevi setast, so ungdómurin verður hjálptir til at orða síni ynskir, og seta krøv. Tá verður ungdómurin hoyrdir og fær tær sømdir sum honum av røttum lutast. Eg vil ein bý, har ungdómurin livur og upplivur sína egnu mentan, í skipaðum og rúsfríðum viðurskiftum, uttan krøv og við egnum fortreytum. Hesum skal u n g d ó m s r á ð g e v i n g i n tryggjað.

**Vinnulív**
Eg vil ein bý, har vinnulívi hevur bestu møgulleikar at menna seg. Tí skulu bý- og bygdaráðini finna semju um at arbeiði verða útbjóða í allari oynni. Eg vil ein bý, har vinnulívi trívist og støðist - og har korini hjá vinnulívinum verða fastløgd. Vinnan má fáa skipað viðurskiftið at virka eftir.

**Menning gjøgnum samstarv**
Eg vil ein bý í mennir seg gjøgnum samstarv. Samstarv er fyritreyt fyri sameining. Uttan álit og uttan royndir at byggja á, verða herðrópini um sameining ein forðing fyri øllum samstarvi. Tí skulu vit skipa samstarv ígjøgnum nevndararbeiði í bý- og býráðunum runt oynna. Vit skulu nærkast hvørjum øðrum, og koma saman um tað, sum vit einast um og virða tað sum vit eru ósamd um.

**Fyrisiting**
Eg vil ein bý og eitt býráð, har vit øll eru trygg í, at okkara viðurskifti verða rætt og rættvíst umsitin. Eg vil ein býráð, har førleiki hevur virði, har opinleiki og gjøgnumskygnið hava innihald. Har rættartrygd hevur týðning. Eg vil ein bý og eitt býráð eyðmerkt av nærlagnið, hegni og virðing fyri borgaranum.

**Samgongulistin vil fremja hesi mál, og fleiri við.**
Samgongulistin vil fíggjarstýra, raðfesta og skipa viðurskiftini hjá okkara eldri, okkara vinnu og borgaranum.

Mítt navn er Jón Guttesen. Og tí bjóði eg meg fram á Samgongulistanum.

Takk fyri og gott val.

# Ungdómurin. Ítróttur og øðrvísi ítróttur

**Jens Johannesen**
*Tvøroyri, valevni javnaðarflosins til býráðið*

VAL04

Ungdómurin er okra besta og týdningarmesta tilfeingi. Teimum skulu okur vara av.

Tað, sum mong ung sakna er eitt stað at vera, tá ikki verður hugsað um okra vanligu ítrótt. Øll eru ikki so hugaði í ítrótti, so fyri hesi eru hesi høli/øki okra líkamiki. Okra ungdómi tørvar t.d. eitt tónleikahøli við allari tónleikaútgerð. Tað er nú einaferð so, at musikskúlin fær ikki tikið øll inn, sum hava hug, tí er tað alneyðugt, at okur ikki missa tey burt, men hava okkurt tilboð til hesi. Okur hava ungar, royndar tónleikarar í býnum, sum tosta eftir einum slíkum høli og umstøðum, og ivaleyst eru fúsir til verka, um teir fáa eitt tilboð.

Prutlkoyring er sera væl umtókt. Okra ungdómur skuldi havt eitt økið, har tey kunnu koyra "motorcross", har tey kunnu fáa sín tørv nøktaðan, fáa upplivilsi, hava dreymar í tryggum umhvørvi, við útbúnum fólki, so tey ikki altíð (og foreldrini við) skulu vera bangin fyri, at politiið skal vera í hølunum á teimum, men heldur fáa politiið hugaðir í slíkum tiltakið, og arbeiða saman við ungdóminum. Tað veit je, teir vilja. Her er møguleiki at nýta náttúruna á ein øðrvísi máta, og pláss hava okur.

Teim tørvar eitt stað, eitt roykfrítt/rúsfrítt umhvørvi/hølið, har øll kunnu vera, sokallaðir ungdómsklubbar. Har kann ungdómurin savnast um spøl, filmar, kvøldsetur o.a., og umsjón skal vera við hesum. Í dag er høvuðstilhaldsstaðið miðbýurin. Tað kann aldri vera rætt.

Tað skulu ikki so ógvuliga nógvir pengar til hesi fyrrnevndu hugskotini. Hølið eigur kommunan, náttúruøki eigur kommunan, so tað skal ikki øll verðin, til at fáa tílíkt upp at standa. Viljin vísir vegin.

Nógv liggur fyri framman.

T.B. er komið í bestu deildina aftur, so har verða tung tøk at taka, tí vøllurin hjá okum kann ikki nýtast til altjóða dystir sum er.. Her má hugsast stórt og framtíðarkent. Je veit, at øll á Tvøroyri eru góð við T.B., tí eiga okur eisini at vera við til at seta karmarnar í góðum og tøttum samstarvi við felagið. Í felag kunnu okur alt. Veit at "nevnd " arbeiðir við onkrum? Her má arbeiðast skjótt og væl. Finnast má fram til eina loysn, sum fer at nøkta tørvin nógv ár framyvir.

Svimjifelagið hevur ikki tær bestu umstøðurnar. Tey gera eitt megnararbeiði, so her hava okur nakað at hugsa um. Eina almenna svimjihøll, til gleði fyri okum øll.

Kommunan hevur verið so "beinasom" at næstan stongja kappróðrarneystið inni, so her verður kommunan noydd at ávísa aðrar møguleikar. Ikki ber til, at bert tey privatu skulu fáa í posa og sekk.

Okur kunnu saman leggja eina framtíðarætlan, so okur, við góðari stýring náa teimum málum, sum sett verða.

Men tað krevur nakað av okra ungdómi, og hesum eri je ikki bangin fyri. Gev ungdóminum ábyrgd, so skulu okur nokk síggja úrslit. Her býr ein góður og raskur ungdómur.

Fara okur inn við einum opnum sinni, kunnu okur saktans náa nógv, men neyvan eftir einum degi.

Skal ein lata seg stilla upp til eitt so týdningarmikið val, er ein noyddur at hava ávísar visiónir. Uttan visiónironga framtíð, men hava okur áræði og dirvi, fáa okur eisini nakað av skafti.

Velur tú nýtt, velur tú eisini nýggjar avbjóðingar. Vel rætt. Vel Jens. Gott val.